# Kunngerð

Vallistin til fólkaatkvøðuna 9. september 2006 yvir veljarar í Gøtu Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 15. august 2006 til 29. august 2006 í vanligari skrivstovutíð.

Valrætt til fólkaatkvøðuna hevur hvør tann, sum er skrásettur í kommununi 01.09.2006, hevur fylt 18 ár valdagin og annars lýkur treytirnar fyri valrætti til løgtingið. Hóast hesa áseting hava ríkisborgarar úr norðurlondum og øðrum londum atkvøðurætt, um teir samanhangandi hava havt fastan bústað í kommununi seinasta árið undan fólkaatkvøðuni.

Kæra um, at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við, skal í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin verða send bygdarráðnum, sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum.

Götu Kommuna



# Kunngerð

Vallistin til fólkaatkvøðuna 9. september 2006 yvir veljarar í Leirvíkar Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 15.august 2006 til 29. august 2006 í vanligari skrivstovutíð.

Valrætt til fólkaatkvøðuna hevur hvør tann, sum er skrásettur í kommununi 01.09.2006 og hevur fylt 18 ár og annars lýkur treytirnar fyri valrætti til løgtingið. Hóast hesa áseting hava ríkisborgarar úr norðurlondum og øðrum londum atkvøðurætt, um teir samanhangandi hava havt fastan búðstað í kommununi seinasta árið undan fólkaatkvøðuni.

Kæra um, at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við, skal í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin verða send bygdarráðnum, sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum.

**Leirvíkar Kommuna**
**FO-520 Leirvík**

# Summar tilboð

Nú er tíð at taka bátin upp á land
til botnreinsan

Vit fara nú sum nakað nýtt at taka bátar upp á Toftum. Møguleiki verður at hava atgongd til trýstreinsara.

Prísdømi 28 Fót 500,- V/MVG
Upp og niður Eingin bíðitíð

Møguleiki er eisini at gera botnsýn

Um hetta hevur tygara áhuga, so ring

**447474 ella 225105**

eisini kan sigast frá á e-mail
*sdbeding@post.olivant.fo*

**SD-BEDING**
Góðkendur glastrevjaverkstaður

**Mentamálaráðið**
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

# FULLTRÚI

**Starvið**
Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum, ágrýtnum og engasjeraðum fulltrúa til Vinnu- og miðnámsskúladeildina. Starvið verður at seta skjótast til ber

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a. at:
- fyrisita, tryggja menning og samstarv, at røkja samskiftið við skúlar, stovnar og øki undir Vinnu- og miðnámsskúladeildini, og at taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi,
- fyrisita og menna útbúgvingar,
- ráðgeva og vegleiða í spurningum innan útbúgving, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.,
- samskipa og skipa fyri felags tiltøkum innan økið,
- fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum,
- taka lut í verkætlanum, her ímillum eisini verkætlanarleiðslu og
- røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar
- hava útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving,
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- eru tænastusinnaðir, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava førleika at menna samstarvið við vinnulívið og áhugafelagsskapir
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**
Innan økið eru fleiri spennandi avbjóðingar, sum fulltrúin kemur at fáa ávirkan á. M.a. verður arbeitt við at dagføra og menna miðnámsútbúgvingarnar, t.e. tær gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar og yrkisútbúgvingarnar, og harumframt verður arbeitt við fleiri skúlabyggingum á økinum.

Starvið er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Mentamálaráðið arbeiðir við elektroniskari skjalahandfaring. Upplæring fæst í hesi skipan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skal sendast til:

Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 4. september 2006, kl. 16.00.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Eyðbjørn Poulsen, deildarstjóra, á tlf. 355075 ella á 555075.

samat.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
Fyriskipanin í Mentamálaráðnum er býtt í 3 deildir – **Fólkaskúladeild, Vinnu- og miðnámsskúladeild og Mentamáladeild**.
**Økið hjá Vinnu- og miðnámsskúladeildini** fevnir um studentaskúlarnar, HF-skeiðini, handilsskúlarnar, teknisku skúlarnar, Fiskivinnuskúlan, Vinnuháskúlan, Klaksvíkar Sjómansskúla, Yrkisdepilin, KT-depilin og lærlingaútbúgvingar.

**TIL SØLU**



**Toyota Hilux 1999**
**4 WHD, 2.5 HDI, Turbo Diesel**

Koyrt 13000 Km
Sýnaður des. 05. Í góðum standi

*Ring Tlf 372300 ella 220053*

**TIL SØLU**

Ford Puma 1,4 í góðum standi.
Árgang 2001, koyrt 43.000 km.
Selist bíliga

*Tel 74 81 79*

**Stoypiarbeiði**

Fólk søkist til at stoypa platt og trappur í Leirvík, skjótast gjørligt.

***Ring og hoyr nærri á tel. 222081***